

## Klaksvíkingar spara

Handlarnir í Klaksvík láta so illa at søluni ío seinastuni, at sambært formanninum í Klaksvíkar Handilsfelag hevur sølan ikki verið so lítil síðani kreppuna í nítiárunum. Við Norðlýsið sigur Magnus Arge, at síðani fólk frættu tíðindini um fíggjarstøæðuna hjá Klaksvíkar kommunu, er sølan í flestu handlum í býnum næstan steðgað upp. Formaðurin í Handilsfelagnum sigur, at handlarnir bíða eftir jólasøluni, men hann stúrir fyri, at kemur ikki okkurt jaligt um Kósavirkið skjótt, eru útlitini fyri jólahandlinum heldur ikki góð.

# Nú borar flaggskipið Stena

**Heimsins mest framkomna boriskip, sum er bygt við serligum atliti til djúpt vatn og ringar veðurumstøður sum tær við Føroyar og Hetland, hevur nú sett borin í skamt frá føroyska markinum. Hetta kann gerast byrjanin til eina nýggja og spennandi tíð á Atlantsmótinum.**

NÝTT BORISKIP

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Um somu tíð sum umboð fyri italska oljufelagið ENI vitjaðu í Føroyum – hetta var í farnu viku - fyri at leggja til rættis boring á føroyska landgrunnimnum næsta ár, so hevur spildurnýggja boriskipið, Stena Carron sett borin í beint hinumegin markið. Hetta er fyrsti brunnurin, sum nýggja boriflaggskipið á Atlantsmótinum borar. Talan er um ein metingar- og avmarkingarbrunn (appraisal well) á longu kenda oljufundinum Rosebank.

ENI fólkini hildu fund í Havn seinasta mikudag, har komandi brunnurin á Anne Marieleiðini á landgrunninum varð á skránni. Fundur var við Jarðfeingi. Brunnurin verður tann sjeyndi leitibrunnurin á landgrunninum og hava jarðfrøðingar úr fleiri oljufeløgum, eisini feløgum, sum ikki eru við í hesi boriverkætlanini, úttalað, at hetta kanska er tann brunnurin við Føroyar, sum sær mest lovandi út, soleiðis sum jarðfrøðiligu viðurskiftini tykjast at hátta sær í undirgrundini. Og tann brunnurin, sum møguliga verður gjøgnumbrotið, sum so mong so leingi hava bíðað eftir.

Tað verður nýggi boripallurin West Phoenix, sum fer at bora Anne Marie brunnin helst í mei ella juni 2009. Umframt ENI eru eisini føroyska Faroe Petroleum og suðurkoreanska oljufelagið Cieco við í boringini. Sosialurin skilur, at onnur oljufeløg, sum halda brunnin verða sera áhugaverdan, hava víst stóran áhuga fyri at keypa seg inn í loyvið. So møguliga fara vit í næstum at frætta, at enn eitt oljufelag verður partur av hesi spennandi boring.

Um sama mundið sum røringur er í her í Havn, so er borurin umborð á boriskipinum Stena Carron farin at mæla á eini longu kendari oljuleið skamt frá føroyska markinum, ein brunnur av fleiri komandi tíðina, sum skal stuðla undir endaliga avgerðini hjá Chevron og tess partanum at byggja út Rosebankkelduna. Rosebankfundið varð gjørt nøkur ár herfyri og metingarbrunnar hava longu staðfest, at her er talan um eitt rakstrarverdugt fund.

Sama boriskipið, sum er farin jomfrútúr út á oljuleiðirnar við markið, skal eftir hesa fyrstu boringina á Rosebankleiðini, bora Cambobrunn, sum liggur syðri, og sum eisini er eitt rasktrarverdugt fund. Amerada Hess, Chevron og onnur feløg skulu eftir ta boringina møguliga eisini til at taka støðu til ein



*Stena Carron á veg til sína fyrstu uppgávu á Atlantsmótinum, at bora ein metingarbrun á Rosebankoljufundinum*
*Mynd Chevron*

## Søgan um Stena Carron

Stena Carron, sum Stena Drilling hevur latið byggja hjá Samsung Heavy Industries í Geoje í Suður Korea, er eitt sokallað tvey-sporað aktivitets-, dynamiskt positións (DP) boriskip designað til at arbeiða alt árið á djúpum vatni.

Chevron hevði ein trý-ára sáttmála við møguleikum fyri longjan við Stena Drilling men hesin sáttmáli er broyttur til ein fimmára sáttmála við optiónum. Chevron Upstream Europe (CUE) ætlar at nýta skipið í teirra leitingar- avmarkingar- og útbyggingarætlanum vestan fyri Hetland, í Norðsjónum og í Føroyum.

Borimøguleikarnir eru rættiliga nýskapandi verður hugt eftir hesum heilt nýggja designi av einum boriskipi – eitt nú er tað vanliga boritornið ikki neyðugt longer og tískil ikki at síggja umborð. Skipið er sera væl útgjørt til at arbeiða í ringum farvatni, eitt nú føroyskum sjógvi og alt er hydrauliskt stýrt umborð. Uttan at fara ov langt inn í tað tekniska, eru serliga tøkniligu borimøguleikarnir teir, sum gera skipið vælegnað til at arbeiða á djúpum vatni.

Rick Cohagan, sum er stjóri fyri CUE, sigur: "Hetta seinasta ættarliðið av boriskipum er ført fyi at arbeiða undir ógvuliga vánaligum umstøðum, so sum vestan fyri Hetland, í Noregi og í Barentshavinum. Bert nøkur fá skip í øllum heiminum eru før fyri at arbeiða alt árið í økjum við sera ringum vetrarveðri.

Dynamiska positiónsskipanin heldur skipið sera neyvt uppá pláss og loyvir skipinum at arbeiða á djúpum vatni, har tað ikki er møguligt at nýta fortoyningar ol.

Viðvíkjandi trygdini so hevur Stena Drilling designað skipið soleiðis, at alt er so automatiserað sum gjørligt, eitt nú verður alt rørarbeiði umborð gjørt við einum fátali av fólki. Hetta verður roknað sum eitt tað mest vandamikla arbeiði umborð á einum boriskipi.

Skipið kann hýsa 180 fólkum. Til at stytta stundir umborð við hevur skipið fimleikahøli, spælirúm við øllum hugsandi spølum og atgongd til tráðleyst internetsamband.

Stena Drilling hevur tradition fyri at kalla boriskip síni upp eftir skotskum áum, og Stena Carron víkir ikki frá hesum í so máta.

*(Kelda Chevron)*